## KOM INN Á GÓLVIÐ OG GER KVETTIÐ

# Páskatilboð



Næstan ALT

-30%

Júník

Galdandi frá mikud. 24/3 til mikud. 31/3 2010

Í miðbýnum | Tel. 32 13 00




# SKRIVSTOVUFÓLK

til koyrikortdeildina

**Atkstovan søkir eftir skrivstovufólki til Koyrikortdeildina at seta beinanvegin. Talan er um eitt fast starv, ið er skipað sum eitt fulltíðarstarv**

UPPGÁVAN

Uppgávan fevnir m.a. um:

- Avgreiðslu av viðskiftafólki og telefonavgreiðslu
- Skráseting og framleiðslu av koyrikortum
- Umsiting av tíðum til ástøðis- og koyriroyndir
- Málsviðgerð
- Postavgreiðslu
- Kassauppgerð

FØRLEIKAKRØV

Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella tílíkari útbúgving og royndum við arbeiði á skrivstovu.

Dentur verður lagdur á, at ein hevur góð samstarvsevni, er fyrikomandi og dugir at arbeiða undir trýsti. Tað er ein treyt, at ein hevur kunnleika til at arbeiða við teldu.

SETANARTREYTIR

Starvið er lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvssetanin hoyrir undir Innlendismálaráðið við tilhoyrandi stovnum, umframt Løgmansskrivstovuna og onnur aðalráð.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Tórunn S. Miðberg, deildarleiðara, á telefon 350 418.

Umsóknir við møguligum prógvum og viðmælum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **29. mars 2010.**

*Akstovan er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur sum endamál at fremja akfaratøkniligar kanningar og akfaraeftirlit, stila fyri koyriroyndum, útvega fólki koyrikort, umsita skráseting av koyrikortum og umsita akfaraskráseting, skrásetingargjøld og vegskatt. Umframt høvuðsdeildina í Tórshavn, hevur Akstovan sýnsdeildir um alt landið. Á Akstovuni starvast 21 fólk.*

AKSTOVAN

Akstovan | Hoyvíksvegur 57 | Postsmoga 3206 | FO-110 Tórshavn
Tel +298 35 04 00 | Fax +298 35 04 01 | www.akstovan.fo | akstovan@akstovan.fo

# ALMENNA BYGGISAMTYKTIN

## Uppskot til broyting í ásetingunum fyri umráðispartarnar D1 í 1. grundumráði, kap. IV, §22

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 18. mars 2010 samtykti broyting í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin í almennu byggisamtyktini er, at ásetingarnar í kap. IV, § 22, verður broytt soleiðis at nýtt soljóðandi stk. 2 verður sett inn.

2. Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvari við stk. 1.

Tilfar, sum lýsir ætlaðu broytingina, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum frá 29. mars til og við 19. apríl 2010, frá mánadegi til fríggjadag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, hósdag tó til kl. 18.00.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 10. mai 2010.

www.torshavn.fo

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



# PÁSKATILBOÐ

## VW Multivan 10 pers. bussur frá juli 2007 til sølu

Bilurin hevur 3,2 bensin V6 motor við 235 hk. Hevur einans koyrt 27.000 km. Er sera væl útgjørdur og hevur...

- Aut. gear + triptronic
- Oljufýring
- Klimaanlegg
- El-síðuhurðar
- Fløguspælara til 6 CD
- Navigatión
- Sóltak
- leðurkabinu

...o.m.a.

**Bilurin verður seldur við stórum avsláttri.**



7 fólk kunnu sita runt um borðið inni í bilinum

**lp@ognir.fo**
**Tlf. 217300**

fleiri myndir á www.ognir.fo